

# Ferðavinnupolitikkur

- Uppskot

V I N N U M Á L A S T Ý R I Ð

# Ferðavinnupolitikkur

## Fororð

Eitt ferðafólk er persónur, sum í stuttleika-, arbeiðs- ella øðrum líkum ørindum er burturi frá sínum heimstaði í longri enn 24 tímar og gistir. Undir hetta heitið koma tá øll tey, sum búgva ella støðast uttanlands og koma[1] til Føroyar

- at selja og keypa vørur og tænastur, og tingast um part í virksemi, sum sambond í Føroyum kunnu geva,
- at vitja slekt og kenningar,
- at uppliva Føroyar, land, mentan og fólk,
- at síggja, medvirka til og luttaka í kappingum í leiki, tónleiki og ítrótti,
- at luttaka í og fyrireika fundir, ráðstevnur o.a., sum verða lagdar til Føroya
- og sum koma til Føroyar á veg til veruliga málið við ferðini.

Ferðafólk eru týdningarmikil fyri Føroyar, tí

- tey bera altjóða samfelagið til Føroyar so ella so,
- tey eru við til at halda uppi og økja um flutningsleiðir og dygd í flutningi,
- tey í størri ella minni mun skapa umsetning og virksemi í Føroyum,
- tey gera Føroyar kendar í útheiminum við at siga frá upplivingini,
- tey skapa í størri ella minni mun persónlig sambond millum fólk í Føroyum og uttanlands, og
- tey gera føroyingin varugan við virði í Føroyum, sum føroyingurin ikki gáar nóg nógv um sjálvur, harafturat styrkir hetta um mentanina.

Í mun til aðrar vinnur er ferðavinna rættiliga ymisk frá øðrum vinnugreinum. Ferðavinna er ein valutaskapandi tænastuvinna, sum er treytað av, at ferðafólk kemur til landið at leggja pening eftir seg. Hettar styrkir samfelagsliga undirstøðukervið, t.e. samferðslukervið innanoyggja og við útheimin, møguleikarnar fyri gistingum, møguleikarnar fyri at nýta tíðina, tú ert í samfelagnum, til hugna, upplivingar, vistir (matstovur, kaféir v.m.), likamliga og mentanarliga uppbygging og til dagdvølju annars. Jú følbroyttari og betri hesir møguleikar eru, tess betri eru møguleikarnir fyri einari týðandi ferðavinnu, og ein ferðavinna í vøkstri styrkir samstundis útbyggingina av hesum møguleikum og styrkir støðið undir fjølbroytni í øðrum vinnum, herímillum kunningartøkniligar vinnur.

Ein arbeiðsbólkur undir Vinnumálastýrinum hevur orðað eitt uppskot til ferðavinnupolitikk.

Í arbeiðsbólkinum hava sitið:

[1] Føroyingurin, sum uttan at fara av landinum er burturi frá sínum heimstaði í meira enn 24 tímar og gistir, er í hesum viðfangi eins týðandi ferðafólk og útlendingurin, sum kemur higar.

- Atli Eiriksson, fulltrúi í Vinnumálastýrinum, formaður og skrivari í arbeiðsbólkinum
- Petur Oliver í Hoyvík, formaður í stýri Ferðaráðsins
- Annika W. Joensen, stjóri, Ferðaráð Føroya
- Hjørdis Zachariassen, innlendisdeild Ferðaráðsins
- Uni Danielsen, stjóri, Flogfelag Føroya, formaður í Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya
- Fríðun Hansen, deildarleiðari á Smyril Line

Síðan Annika W. Joensen fór í annað starv, hevur Heri Niclasen, stjóri Ferðaráðsins, verið limur í bólkinum.

Uppskotið hevur verið til ummælis, og innkomnu viðmerkingarnar eru saman við uppskotinum samanskrivað til hetta nýggja uppskotið um ferðavinnupolitikk. Ein minni bólkur, samansettur av Hera Niclasen, stjóra á Ferðaráðnum, Kjartani Kristiansen, stjóra á Menningarstovuni og Evu H. Bennicke, fulltrúa í Vinnumálastýrinum, hevur samanskrivað uppskotið til politikkin.

Dentur verður lagdur á tey mál, ið Vinnumálastýrið umsitur, men mál, sum onnur stýri umsita, verða í ein vissan mun eisini viðgjørd.

## Støðan

Kjarnin í ferðavinnu er flutningur, gisting og endamálið við eini ferð. Nógv ymisk áhugamál eru knýtt at einum ferðamáli (destination). Ferðafólkið hevur sítt endamál við ferðini, t.d. vinnuørindi, og "ferðamálið" roynir at tryggja inntøku, arbeiðspláss, gagnnýta undirstøðukervið, varðveita umhvørvið, attraktiónir og at marknaðarføra til tess at standa seg í kappingini við onnur ferðamál.

Menningin innan flutning og kunningartøkni hevur ført við sær, at ferðavinnan er heimsumfatandi, og at allur heimurin er ein felagsmarknaður, har alsamt fleiri lond bjóða seg fram sum ferðamál.

Vinnan verður í stóran mun stýrd av stórum ferðavinnusamtøkum, sum gera eina heildarmeting av ymsu ferðamálunum (t.d. londum, landspørtum) har dentur verður lagdur á kostnað og dygd á "vøruni" - herímillum gistingarmøguleikar, flutningsmøguleikar, mentanartilboð, útferðir, kunningartøkni, og sum meta um, hvørt ferðavinnan verður stýrd professjonelt.

Vaksandi kappingin setur stór krøv til marknaðarføring av einum ferðamáli. Mett verður, at tað at vera sjónligur, fylgja við, nýta og vera frammarlaga í brúki av kunningartøkni, hevur stóran týdning fyri at standa seg í kappingini.

Skipað samvinna er í nógvum londum millum tað almenna og vinnuna fyri at fremja marknaðarføring og vørumenning, og til tess at tryggja, at ein vøkstur í ferðavinnuni hevur atlit at samfelagnum annars, t.d. atlit at náttúru og umhvørvi, og verður ein partur av frítíðarvinnuni á staðnum.

Roynt verður ikki bert at fáa ferðafólk til landið, men eisini at fáa borgararnar í landinum at ferðast í egnum landi.

Menning og nýskapan innan ferðavinnu kann snúgva seg um at betra verandi ferðavinnuumstøður, menna nýggj ferðavinnutilboð, betra kunningar- og tænastustøðið ella at menna góðskustýringsskipanir, sum skulu tryggja kundunum dygd og upplivingar.

Ferðafólk nú á døgum eru von við at ferðast, og eru ógvuliga tilvitað um dygdina av upplivingum og tænastum, sum verða boðin teimum. Fólk halda í størri og størri mun fleiri stuttar feriur um árið, og er tí møguleiki fyri at spjaða ferðavinnutíðarskeiðið til størri part av árinum.

Í stuttum ber til at siga, at ferðavinnan í Føroyum enn er ein lutfalsliga lítil vinna, sum tykist at vaksa og mennast, so hvørt øktur eftirspurningur eftir ferðavinnutænastum betrar fíggjarliga grundarlagið, og undirstøðukervið í landinum sum heild gerst betri.

## Hugsjón og mál

Hugsjónin í vinnupolitikkinum er ein sjálvberandi føroyskur búskapur, ið byggir á ymiskar vinnur, sum skapa avkast, framburð og vælferð í fríari altjóða kapping, og sum raðfestir trivnað og umhvørvi ovarlaga.

Samtykti vinnupolitikkurin leggur dent á fýra tættir, sum hava avgerandi týdning fyri, hvussu vinnupolitiska kósin verður skipað og eftirmett, so hon støðugt kann verða hildin á rættari leið, nevniliga:

- leiklutin hjá tí almenna
- karmar
- netverk og
- hagtalsgreiningar

Ferðavinnan er sum so eingin sjálvstøðug vinna. Heldur er hon ein samanrenning av øllum vinnum í landinum og av einum og hvørjum sjálvbodnum og áhugakendum virksemi. Flutningur, gisting, vistir og tænastur í sambandi við hetta verða tó, sum fyrr nevnt, altíð lyklavinnur, tá vit tala um ferðavinnu.

Endamálið við ferðavinnupolitikkinum er at orða uppskot um, hvussu tað almenna kann vera við til at skipa og menna Føroyar sum ferðamannaland, soleiðis at ferðavinnan verður ein meiri týðandi táttur í samfelagsbúskapinum.

**Ferðavinnan eigur at vera ein sjálvberandi, kappingarfør vinna, sum leggur dent á dygd, tænastustøði og samstarv.**

**Ferðavinnan eigur í menning sínari at hava atlit at náttúru, umhvørvi, mentan og føroyska samfelagnum sum eina heild.**

## Lutmál og miðlar

Til tess at røkka hugsjónini verða her uppsett og viðgjørd lutmál og miðlar út frá teimum omanfyrinevndu fýra høvuðstættunum í vinnupolitiska arbeiðinum, lýstir í ferðavinnupolitiskum høpi:

## Leikluturin hjá tí almenna

Uppgávan hjá tí almenna innan ferðavinnu er, sum staðfest í vinnupolitikkinum, at skapa stabilar karmar fyri vinnuna.

Stabilir karmar eru m.a. at greiðir lógarkarmar eru settir fyri ferðavinnuna. Ferðavinnan er ein fjøltáttað vinna, sum verður regulerað av nógvum ymiskum lógum. Umframt reguleringar innan vinnumál verður ferðavinnan eisini regulerað av reglum innan onnur málsøki, til dømis innan fíggjar- og umhvørvismál, fiskivinnumál, undirvísingar- og mentamál. Tað almenna eigur at hava ferðavinnuna í huga, tá ið lógaruppskot verða gjørd, sum kunnu hava avleiðingar fyri vinnuna.

Innan ávísar partar av ferðavinnuni henda stórar broytingar á altjóða marknaðinum. Tað almenna kann vera við til at seta karmar fyri, hvussu vinnan í Føroyum skal laga seg til broytingarnar, so at tørvurin hjá vinnulívi, borgarum og ferðafólki verður nøktaður samstundis.

Ferðaráð Føroya er tann almenni stovnurin, sum hevur sambandið og samstarvið við ferðavinnuna.

**Høvuðsuppgávur Ferðaráðsins eru:**

- **at menna Føroyar sum ferðamannaland**
- **at kunna um og marknaðarføra Føroyar sum ferðamál**

## *Uppgávan at menna og ráðgeva ferðavinnuni*

Kjarnin í innanlands menning Ferðaráðsins er at vísa vinnu, kommunum og økisferðavinnufeløgunum á gongdar leiðir í menningini av ferðavinnuni; at ráðgeva um, hvussu hetta kann fremjast í verki og virka fyri, at vinnan hevur góðar karmar at virka undir.

Góð og samskipað tænasta, góðska og trúvirði eru aðaltættir í ferðavinnu. Til at fremja hesar tættir eigur Ferðaráðið at eggja til og fremja samstarv millum øll tey, sum virka í og í sambandi við ferðavinnuna, um samskipaðar menningarætlanir fyri alt landið, góðsku- og førleikamenning, herundir um stigfesting av gistingarveitingum og matstovum. Ferðaráðið eigur herumframt at ráðgeva og eggja til menning og marknaðarføring av felags ferðamanna-tilboðum og ferðavinnutiltøkum. Í hesum sambandi eigur Ferðaráðið at eggja vinnu, stovnum og feløgum at skipa so fyri, at eisini ferðafólk við ymiskum brekum kunnu gera gagn av tilboðum og tiltøkum.

## *Ferðaráðsins leiklutur sum samskipari*

Nógv ymisk áhugamál eru knýtt at ferðavinnuni. Samstarv er alneyðugt í kappingini við onnur lond í heiminum.

Høvuðsmálið er at fáa ferðafólk til Føroya. Her er dygdin av marknaðarføringini umráðandi. Resursurnar til marknaðarføring eru avmarkaðar. Eisini tí er samstarv um marknaðarføring alneyðugt. Ferðaráðið hevur til uppgávu at skipa fyri størri samstarvi millum aktørarnar í vinnuni, m.a. um felags marknaðarføring.

Ferðaráðið eigur í hesum sambandi at bjóða vinnuni til samskipan og samstarv um marknaðarføring, t.d. skipað í einum marknaðarbólki undir leiðslu Ferðaráðsins, mannað við umboðum frá feløgunum, sum vilja nýta pening til felags marknaðarføring eitt ávíst ár. Í slíkum samstarvi kundi verið funnið fram til ein felags profil fyri Føroyar sum ferðamál. Hetta hevur leingi kenst neyðugt.

Ferðaráðið eigur somuleiðis at samstarva við økisferðavinnufeløgini um at kunna um og marknaðarføra ymsu lokalu økini, so hesi í munandi størri mun fáa møguleika at bjóða seg fram í ferðavinnuhøpi og fáa ágóða og royndir í ferðavinnu.

Ferðaráðið eigur at leggja dent á, at nútímans kunningartøkni verður nýtt í marknaðarføringini av Føroyum sum ferðamál. Eitt nú við at heimasíðan hjá Ferðaráðnum gerst eitt portur til føroyska ferðavinnu, sum vísir/hevur tilvísingar til eitt nú ferðamannatilboð, mentanartilboð og flutnings- og gistingarmøguleikar. Samstarv við vinnuna og við kunningarstovurnar um

hetta mál, sum eisini kann fata um eina bíleggingar-skipan, er táttur í samskipandi leiklutinum.

## Karmar

### *Eitt virkið regluverk, lagað til altjóða marknaðarsamstarv*

Ferðafólk, sum koma til Føroyar, skulu kenna seg trygg, tá tey nýta ferðavinnutilboðini, sum verða útbjóðað. Tey skulu hava álit á, at krøv eru sett til trygging og heilsu- og arbeiðstrygd, og at hesi liva upp til altjóða standardir.

Ferðafólk eru oftast fólk, sum koma fyri at uppliva náttúruna. Tey leggja dent á, at náttúran og umhvørvið verða varðveitt. Tað er týdningarmikið, ikki bert við atliti at ferðavinnuni - men yvirhøvur - at farið verður væl við náttúruni, umhvørvinum og dýrunum.

Vinnumálastýrið vil arbeiða fyri at fremja reglur, sum gagna omanfyrinevndu krøv, uttan tó at nerva virksemið í órímiligan mun. Tað er tó eisini ein spurningur um hugsburðsbroyting. Ein hugburðsbroyting, har ein eigur at hava í huga, hvussu støðan er í útheiminum. Tað er jú útheimurin, sum kappast skal við, tá tað snýr seg um at fáa fleiri ferðafólk hendavegin. Tá ið ferðavinnan í veruleikanum er so breið, sum hon er, skulu bæði vinna, myndugleikar og onnur, sum kanska ikki í fyrstu syftu tæna ferðavinnuni, hava ferðamannin í huga.

### *Vælvirkandi samskifti og samferðsla við útheimin*

Samskiftið og samferðslan við útheimin fer fram við skipum, flogførum, gjøgnum kaðal og um fylgisvein. Samskiftið má metast at vera regluligt, men veikt í tann mun, at tað fær týðandi avleiðingar fyri samfelagið og vinnuna, herundir eisini ferðavinnuna, um ein av møguleikunum svíkur. Hetta er orsøkin til, at tað almenna er farið so langt í leikluti sínum at tryggja karmar og undirstøðukervi fyri samskiftis- og samferðsluviðurskiftum við útheimin, eins og í øðrum londum, at tað hevur staðið fyri stórum parti av flutninginum. Tað er ikki tann vegin, vinnupolitikkurin gongur í dag. Roynt verður tvørturímóti at liberalisera vinnuna í tann mun, tað er gjørligt. Tí er ein stór avbjóðing hjá tí almenna at tryggja gongdini móti fríari, altjóða kapping í øllum flutningi, uttan samstundis at seta allan flutningin í vanda.

Um allan heim verður flogferðsla alsamt meira liberaliserað, og tað merkir príslækkingar innan økið. Fræls kapping er eisini innan ES/EBS-økið, og í okkara parti av heiminum eru bert Føroyar og Grønland uttanfyri hetta

samstarv. Í 2000 hava flogfeløgini havt átøk við lágum prísum í ávísum tíðarskeiðum á árinum, og hetta eru fyrstu tekin um eina størri príiskapping á rutuni millum Føroyar og Danmark.

Vinnumálastýrið vil stuðla undir gongdina í tann mun, hon nøktar tørvin hjá vinnulívi, borgarum landsins og ferðafólki best møguligt, og samstundis á bestan hátt gagnar føroyska samferðslukervinum í síni heild.

Grundað á tann alstóra týdning, flogvøllurin hevur fyri ferðavinnuna, av tí at umleið 80% av teimum ferðandi fara um vøllin, vil Vinnumálastýrið virka fyri at betra um flogvallarumstøðurnar til tess at betra kapasitetin og reglusemið.

Hin møguleikin at koma frá útlondum til Føroya er sjóvegis. Hesin verður røktur einsamallur av einum føroyskum felag. Landsstýrið ynskir, at tað framhaldandi skal vera møguligt at koma til Føroya sjóvegis, og at tað, sum tað hevur verið seinastu árini, framvegis eigur at vera uttan almenna uppílegging.

## *Gransking og førleikamenning*

Meira málrættað tænasta og samskipan av ferðavinnuni krevur kunnleika um, hvussu nógv ferðafólk koma til Føroya, hvørji ferðafólkini eru, hví tey velja Føroyar sum ferðamál, hvat tey vænta sær av Føroyaferðini og um Føroyar kunnu bjóða teimum tað, tey vilja hava. Tey hagtøl, ið hava verið framløgd, hava ikki verið savnað og samskipað soleiðis, at tey kunnu brúkast til eina størri meting av ferðavinnuni í Føroyum. Tørvur hevur leingi verið á størri kunnleika um ferðavinnuna afturat verandi hagtølum fyri flutning og gisting, og teimum stakroyndum, sum Ferðaráðið hevur latið gjørt. Hagtøl, sum lýsa búskaparliga týdning ferðavinnunar, og sum kunnu vera grundarlag fyri munadyggari marknaðarføring, har undir hvørji ferðafólk, satsað eigur at verða uppá.

Umfatandi kanning er nú gjørd av føroysku ferðavinnuni. Uppskot verður gjørt um mannagongd fyri slíkum arbeiði í framtíðini, hvussu stakroyndir kunnu gerast, ið geva greiða ábending um gongdina í vinnuni, og eisini hvussu størri kanningar kunnu gerast. Neyðugt er, at kanningin, sum Granskingar-depilin hevur gjørt, verður fylgd upp, soleiðis at marknaðarføringin, ferðavinnutiltøkini v.m. kunnu fylgja gongdini í eftirspurninginum. Av tí at tølini yvirhøvur eru smá, eigur serligur dentur at verða lagdur á at kanna og fylgja gongdini í smærru bólkunum, ið kunnu vísa, hvør áhugi í altjóða ferðavinnurákinum er fyri Føroyum sum ferðamannalandi.

Mett verður, at tørvur er á ráðgeving og stuðuli til fólk og virki, sum hava hugskot um menning av ferðavinnuni, bæði hjá verandi og nýggjum fyritøkum.

Tí ræður um at nýta verandi vitan á økinum innan útbúgving og ráðgeving í hesum sambandi, og Ferðaráðið eigur at útbyggja sítt samstarv til slíkar stovnar og feløg í landinum og vísa til tey, har hetta er gagnligt.

Við vinnupolitiska ynskinum um at økja um ferðavinnuna í Føroyum er avgjørt neyðugt at hækka samlaða útbúgvingarstøðið hjá teimum, sum starvast innan ferðavinnuyrkið. Ferðaráðið eigur at eggja vinnuni til at útbúgva starvsfólk síni við t.d. ferðafólkatænastu-skeiðum, ferðaleiðaraskeiðum og skeiðum innan mál, leiðslu og sølu.

Í samstarvi við vinnuna eigur Ferðaráðið saman við útbúgvingarstovnum at leggja til rættis eina ferðavinnuútbúgvingarætlan, har mett verður um ítøkiliga útbúgvingartørvin, og har formliga grundarlagið fyri útbúgvingunum í Føroyum verður lagt til rættis (reglugerðir og lesiætlanir).
Harumframt eigur vitan um ferðavinnuútbúgvingar uttanlands at verða savnað.

## *Vælútbygt undirstøðukervi, ið mennir kappingarførum lívskorum um alt landið*

Samferðslumøguleikin hevur avgerandi týdning fyri ferðavinnuvøkstur uttan fyri miðstaðarøkið. Samferðslan við oyggjarnar uttan fyri Eysturoy og Stremoy gongur við ferjum ella tyrlu. Tað hevur við sær, at vitjandi noyðast at laga seg eftir, nær slepst til og frá oyggjunum. At betra um samferðslumøguleikarnar hevur tí stóran týdning fyri bæði íbúgvarnar á oyggjunum og eisini fyri ferðavinnuna.

Strandfaraskip Landsins er við sínum landsumfatandi flutningskervi kjarnin í innanlands ferðafólkaflutninginum, og hevur ein sera týðandi leiklut fyri ferðavinnuna sum heild og fyri økismenningina. Tí er reglusemi, kunning og tænastustøði stovnsins sera týdningarmikið. Ætlandi verður ferðafólkaflutningin innanlands bjóðaður út í so stóran mun, sum til ber, undir samskipan av Strandfaraskipum Landsins.

Harumframt verður arbeitt við at útbyggja undirstøðiskervið innanlands so hvørt, sum tørvur er á tí, og samfelagsbúskapurin gevur møguleikar fyri tí.

Dentur verður lagdur á at fáa økisferðavinnuna at vaksa soleiðis, at ferðafólk fáa fleiri ymisk tilboð, at útoyggjarnar mennast, og at vinningurin av ferðavinnuni kemur fleiri til góða. Ein økt økisferðavinna kann somuleiðis lætta um  verandi kapasitetstrupulleikar. Sjálvt um bøtt verður um samskiftismøguleikarnar, er vøkstur treytaður av møguleikunum fyri gisting og matstovur v.m.

Skal økisferðavinnan vaksa, skal tað henda út frá áhuga, arbeiði og vilja hjá fólki á staðnum. Tey hava ofta hugskot um, hvat tey kunnu bjóða ferðafólki, og hvussu tað kann gerast.

Í hesum sambandi hava økisferðavinnufeløgini, sum reka 7 kunningarstovur, ein týðandi leiklut, og Ferðaráðið eigur at stuðla og eggja teimum til at virka fyri at kunna um, samskipa og menna lokalu ferðavinnuna. Økisfeløgini kunnu vera tann samskipandi pallurin fyri tey lokalu tiltøkini innan ferðavinnuna, sum fáa knýtt tey lokalu tiltøkini saman við ferðasmiðum, og soleiðis fáa sent tilboðini út á (tann altjóða) marknaðin.

Ferðaráðið eigur somuleiðis at eggja økisferðavinnufeløgunum til, í samstarvi við kommunur og vinnuna á staðnum, at gera egnar økisferðavinnuætlanir, sum:

- nágreiniliga lýsa støðuna hjá ferðavinnuni á staðnum
- orða høvuðsmálini fyri ferðavinnuna
- hava eina ætlan fyri, hvussu verandi og nýtt lívført ferðavinnuvirksemi kann verða ment

Innlendisdeild Ferðaráðsins eigur at bjóða økisferðavinnufeløgunum og kommununum til samstarv um fremjing av økisferðavinnuætlanum og øðrum ítøkiligum ætlanum.

Ferðaráðið eigur at eggja og stuðla skrivstovunum hjá økisferðavinnu-feløgunum (t.d. kunningarstovunum), at virka sum tænastudepil fyri vinnu, mentanar- og frítíðarítriv í økjunum og at fremja uppbyggjandi samstarv millum aktørarnar í ferðavinnuni á staðnum, soleiðis at vinnan virkar sum ein heild, sum setur felags mið, virkar fyri at hækka tænastustøðið, kunnleikastøðið, dygd á øllum økjum og økir ferðamannaútboðið.

Kommunur, sum ynskja lut í ferðavinnuni, eiga í ráðlegging sínari, í sambandi við býar- og byggisamtyktir, at taka hædd fyri ferðavinnuni, t.d. gisting, tjaldingarplássum, saniterum viðurskiftum, skelting o.ø., sum kommunurnar eisini hava ábyrgdina av. Í samband við gerð av t.d. nátthúsi, eiga kommununar at hugsa um, at tey verða gjørd soleiðis, at fólk við koyrastóli fáa brúkt tey. Tað er eisini skilagott, um kommunurnar samskipa frítíðar- og mentanartilboð við tilboð til ferðamannin á staðnum.

Ferðaráðið eigur at eggja til økisferðavinnutiltøk eitt nú við at bjóða stuðul, upp til triðing av kostnaðinum av tiltøkum, sum verða gjørd í tøttum samstarvi millum Ferðaráðið, kommunur og ta lokalu ferðavinnuna, treytað av at hinir báðir partarnir bera restina í felag.

Landsverkfrøðingurin hevur ferðavinnuna í huga í sambandi við nýgerð av landsvegum. Stovnurin hevur gjørt dvalavikar, skipað fyri skelting, gjørt

nátthús, tømistøð til húsvagnar/ferðabussar o.a. Íløgur, sum ikki bert gagna ferðavinnuni, men samferðsluni yvirhøvur.

## *Ferðamannatilboð og attraktiónir*

Ferðafólk, sum koma til Føroya, vilja uppliva náttúru og mentan okkara, og tí skal ferðavinnan í menning sínari hava atlit at varðveitslu av náttúru og umhvørvi.

Viðkvom øki í landinum eru skrásett og lýst í Økisferðavinnuætlan frá 1994, og eiga vit at fylgja við, hvussu leikur fer, soleiðis at skaði ikki hendir. Ansast skal eftir, at ferðavinnan ikki sjálv slítur náttúruna, tí tað er júst náttúruna, fólk koma til Føroya fyri at uppliva.

Dentur skal leggjast á, at tjaldingarmøguleikarnir og tey saniteru viðurskiftini eru í lagi, og at tey kunnu nýtast av øllum. Við skelting og varðveitslu av gomlu hagagøtunum kann ferðafólkastreymurin í náttúruni stýrast í ávísan mun.

Skipað viðurskifti gagna ferðafólki, eigarum og náttúruni, tí eigur Ferðaráðið at taka mál upp við avvarðandi myndugleikar, ognarmenn, bøndur og feløg um, hvørt vandi er fyri munandi árini á náttúruna. Økisferðavinnufeløgini eiga, í samráð við áhugafeløg og onnur, at gera yvirlit yvir og ætlanir um millum annað fiskimøguleikar og nýggjar gøtur í náttúruvøkrum økjum.

Ferðafólk flest vitja mentanarstovnar okkara, t.d. Norðurlandahúsið, Listaskálan, Fornminnissavnið, o.s.fr. Tí eigur Undirvísingar- og Mentamálastýrið at hava ferðavinnuna í huga í menningini av mentanarstovnum sínum, herímillum upp- og afturlatingartíðir hjá stovnum, sum hava stóran týdning fyri ferðamannin og heimafólkið, herundir um høgtíðir og frítíðarskeið, t.d. heyst- og vetrarfrítíðir.

Um íløgur verða gjørdar í kostnaðarmiklar attraktiónir, t.d. golfbreyt og sjósavn, eigur hetta fyrst og fremst at verða gjørt fyri at økja um frítíðartilboðini hjá fólki á staðnum, og síðan gagnar hetta eisini ferðavinnuni. Frítíðarvirksemi og ferðavinna gerast soleiðis ein heild, so sum gongdin eisini er í grannalondum okkara. Eisini tá tað snýr seg um at gera attraktiónir, eigur atlit at verða tikið til fólk við brekum.

Ferðaráðið eigur í samstarvi við eigarar, søvn og onnur at kanna, um attraktiónir í Føroyum kunnu skrásetast sum World Heritage, ið er ein altjóða skipan undir UNESCO. Tað kann vera við til at gera Føroyar sjónligari í ferðavinnuhøpi, tí lýsingarvirðið er stórt.

*Fíggjarligur stuðul, skatta- og avgjaldsskipanir*

Miðað verður ímóti at vinnan í størst møguligan mun er sjálvberandi við so lítlum búskaparligum stuðli frá tí almenna sum møguligt. Tann stuðul, sum verður veittur, eigur í høvuðsheitum at vera generellur og til tiltøk, sum styrkja samstarv ella vísa á nýggja leiðir.

Vinnumálastýrið vil arbeiða fyri at loyva tollfríari sølu av vørum í Vága Floghavn fyri ferðandi.

## Netverk

Netverk við útlondini er avgerandi fyri menningina av ferðavinnuni í Føroyum. Í dag er sambandið við onnur lond knýtt at nógvum ymsum miðlum og kunningartøkni. Menningin gongur skjótt og tað er týdningarmikið, at føroyingar, frá barni av, hava møguleika fyri at brúka og blíva vælkendir við menningina av kunningartøkni, soleiðis at samfelagið sum heild verður á einum høgum støði kunningartøkniliga. Hetta gevur møguleikar fyri menning innan vinnulívið sum heild og eisini innan ferðavinnunan. Vinnumálastýrið vil saman vil øðrum myndugleikum virka fyri at betra um møguleikarnar og atgongdina til kunningartøkni.

Kunningartøkni er, sum omanfyri greitt frá, týdningarmikil miðil í ferðavinnuni, men gloymast má ikki, at sambandið andlit til andlits eisini er umráðandi innan sølu. Ein stórur partur av uppgávunum í ferðavinnuni er marknaðarføring av Føroyum. Tí eru marknaðarstevnur, framsýningar v.m. av stórum týdningi.

Ferðaráðið eigur sjálvandi at hava eitt tætt samstarv við bæði føroyskar og útlendskar fyritøkur, og at styðja uppundir samstarv millum føroyskar og útlendskar fyritøkur. Serliga tey størru flutningsfeløgini hava eitt fjøltáttað samskifti og samstarv við ferðaskrivstovur, flutningsfeløg, umboðsstovur og onnur úti í heimi um t.d. marknaðarførslu og sølu, sum eisini tryggjar teimum dagførda vitan um ferðavinnumál. Tey hava hvør sítt netverk, og tí er ynskiligt, at feløgini samstarva um so nógv mál sum gjørligt, sum gagnar feløgunum og ger Føroyar sjónligari í altjóða høpi.

Ferðaráðið luttekur í samstarvi millum Grønland og Ísland í felagsskapinum Vestnorden Tourist Board, sum m.a. skipar fyri Vestnorden Travel Mart, har ferðavinnan hevur møguleikar fyri at luttaka, og á tann hátt møta, samstarva og mennast saman við ferðavinnuni í hinum londunum.

Føroyar og Ísland hava gjørt eina samstarvsavtalu um ein felagsskap - FITUR - sum gevur ymsar møguleikar fyri samstarvi, menning og netverki millum

føroyskar og íslendskar fyritøkur, umframt stuðul til ferðatiltøk millum londini. Ein líknandi felagsskapur - SAMIK - er millum Ísland og Grønland.

Vinnumálastýrið luttekur í tí norðurlendska samstarvinum, har tað millum annað verður arbeitt við ferðavinnumálum. Tað er tó týdningarmikið, at føroyingar ikki bara røkja netverkið við norðurlendsku londini, men eisini hava áhuga í og arbeiða fyri netverki við onnur lond.

## Hagtalsgreiningar

Ferðaráðið skal menna ferðavinnuna í Føroyum. Fyri at kunna gera tað, má ráðið hava skjalatilfar, sum vísir, hvussu støðan er, hvussu vinnan mennist og sum vísir broytingar í ferðamyndini o.m.a.

Ferðaráðið eigur tí at arbeiða fyri, at hagtøl fyri ferðavinnuna verða útvegað, savnað og kunnað ferðavinnuni og almenninginin sum heild. Kanningar eiga at vera gjørdar við jøvnum millumbili – sum lýsa veruligu gongdina í ferðavinnuni og sum lýsa trends og lykladata, sum fokus eigur at verða sett á

Ferðaráðið og Hagstovan samstarva um, at savna inn hagtøl um ferðavinnuna. Vinnan skal koma við upplýsingunum, og tað er tí týdningarmikið, at vinnan sær fyrimunin í at veita upplýsingarnar, og skilir, hvussu neyðugt tað er at savna hagtøl. Ferðaráðið eigur at vísa vinnuni á týdningin av at savna upplýsingar, gera hagtøl og vísa á úrslit av prosessini. Eitt neyvt samstarv hesum viðvíkjandi er tí alneyðugt fyri at fáa eina góða mynd av støðuni.